TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

**Dagfesting:** 29.12.2022 kl. 17:00
**Málnr.:** 20/00367

Nevndarlimir: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen, Jónleyg Jespersen Bech, Bjarni Hammer, Kristina Roest, Súsanna Bertholdsen

Varalimir:

Ikki møtt:

Onnur:

Nevndarskrivari: Fróði Mortensen

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til støðutakan** | | |
| 79/22 | 22/00412-1 | Býráðsfundir -fundardagar í 2023 |
| 80/22 | 22/00470-2 | Umsókn um stuðul til nýggjárshald 2022/2023 (Nýggjársnevndin) |
| 81/22 | 22/00437-2 | TB-Flogbóltur umsókn um stuðul 2022 |
| 82/22 | 22/00458-7 | Umbøn at keypa lendi frá kommununi á Børkugøtu- |
| 83/22 | 21/00422-4 | Brúgvagjøld dagførast |
| 84/22 | 22/00340-1 | Kommunusamanlegging |
| 85/22 | 21/00577-2 | Flutning av mors |
| 86/22 | 22/00438-3 | BHS -Fíggjarætlan 2023 fyri Bú- og Heimatænastuna |
| 87/22 | 22/00138-1 | Ítróttarhølllin -dagføringar/umvælingar Eýkajáttan |
| 88/22 | 22/00305-2 | Keyp av flishøggara til ruskplássið |
| 89/22 | 22/00411-1 | Eykajáttanir -flyting millum íløgu og rakstrarstøð FÆ2022 |
| 90/22 | 22/00129-1 | Lukka mál |
| **Til kunningar** | | |
| 46/22 | 22/00096-1 | Skattatøl 2022 |

| | | |
|---|---|---|
| 47/22 | 22/00485-2 | IRF -Koyrigjaldið hjá IRF hækkar 1. jan. 2023 |
| 48/22 | 22/00484-5 | SEV -Fundarfrásøgn frá eykaaðalfundi des. 2022 |
| 49/22 | 22/00395-3 | Samstarvsavtala um tilbúgving millum Tvøroyrar kommunu, Hvalbiar kommunu og Fámjins kommunu |
| | | |

Kristin Michelsen setur fundin, lesur skránna og spyr um viðmerkingar eru.

Súsanna Bertholdsen ynskir viðmerkt, at hon ynskir at val av stýrislimun í Bú- og Heimatænastuna umboðandi Tvøroyrar kommunu verður sett á skrá av nýggjum, har limirnir verða valdir samb. lutfallvalháttinum.

Kristin Michelsen upplýsir, at val av  stýrislimum í Bú- og heimatænastuna BHS er avgreitt av Tvøroyrar býráð, við 3 viðgerðum og samtyktum í januar og februar 2021, samt 3. februar 2022.

Kristin Michelsen upplýsir øllum býráðslimum eftir fundin, at hann hevur í dag móttikið umsókn um byggiloyvið til Protein & Lýsifabrik frá Boga Mortensen, stjóra í P/F Varðin Pelagic.

**Til stoðutakan**

**79/22**
**22/00412-1 Býráðsfundir -fundardagar í 2023**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 21.11.2022 | 117/22 |
| 2 Býráðið | 29.12.2022 | 79/22 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 08.11.2022**
Mælt verður til at hava býráðsfundir samb. niðanfyri skrá.

| Jan. | Feb. | Mar. | Apr. | Mai | Jun |
|---|---|---|---|---|---|
| Tór. 26 | Tór. 23 | Tór. 30 | Tór. 27 | Tór. 25 | Tór. 29 |

| Jul. | Aug. | Sep. | Okt. | Nov. | Des. |
|---|---|---|---|---|---|
| ongin | Tór. 31 | Tór. 28 | Tór. 26 | Tór. 30 | Tór. 21 |

## Býráðsfundir

Býráðsfundir eru vanliga eina ferð um mánaðin, -seinasta Tórsdag í hvørjum mánaði-. Allir býráðsfundir vera hildnir á Kommunuskrivstovuni, á Tvøravegi 37, í býráðssalinum kl. 17.00.

Mál, ið ynskjast viðgjørd á býráðsfundi, mega verða býráðnum í hendi í seinasta lagi hin 5 dagin í mánaðinum, sum býráðsfundurin er.

Umframt regluligu býráðsfundirnar kann býráðið halda eykafundir, tá ið støðu skal verða tikin til týdningarmikil mál, sum hava skund.

Juli og august heldur býráðið summarfrí.

## Fíggjarnevndin

Fíggjarnevndin hevur vanliga fund, tórsdag vikuna fyri sum býráðsfundur er.
Mál, ið ynskjast viðgjørd í Fíggjarnevndini, skulu verða kommununi í hendi í seinasta lagi hin 5 dagin í mánaðinum, sum fíggjarnevndarfundur er.

## Sosialanevnd

Sosialanevndin hevur vanliga fund, í vikuni fyri fíggjarnevndarfund.

Mál, ið ynskjast viðgjørd í Sosialanevnd, skulu verða kommununi í hendi í seinasta lagi hin 5. í mánaðinum, sum sosiala nevnd hevur fund.

## Mentanarnevndin

Mentanarnevndin hevur vanliga fund, týsdag vikuna fyri fíggjarnevndarfund.

Mál, ið ynskjast viðgjørd í Mentanarnevndini, skulu verða kommununi í hendi í seinasta lagi hin 5. í mánaðinum, sum mentanarnevndin hevur fundur.

## Tekniska nevnd

Tekniska nevnd hevur vanliga fund, mánadag vikuna fyri fíggjarnevndarfund.

Mál, ið ynskjast viðgjørd í Teknisku nevnd, skulu verða kommununi í hendi í seinasta lagi hin 5. í mánaðinum, sum teknisknevnd hevur fund.

## Trivnaðar- og umhvørvisnevndin

Trivnaðar- og umhvørvisnevndin hevur vanliga fund í vikuni fyri fíggjarnevndarfund.

Mál, ið ynskjast viðgjørd í Trivnar- og umhvørvisnevndini, skulu verða kommununi í hendi í seinasta lagi hin 5. í mánaðinum, sum Trivnar- og umhvørvisnevndini hevur fund.

## Vinnu- og havnanevndin

Vinnu- og havnanevndin hevur vanliga fund, mánadag vikuna fyri sum fíggjarnevndar fundur er.

Mál, ið ynskjast viðgjørd í Vinnu- og havnarnevndini, skulu verða kommununi í hendi í seinasta lagi hin 5. í mánaðinum, sum Vinnu- og havnarnevndin hevur fund.

**Lógargrundarlag:** Løgtingslóg um kommunustýri, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 57 frá 30. apríl 2018 (Kommunustýrislógin) Kapittul 3. Kommunustýrisfundir

§ 13. Kommunustýrið hevur vanliga fund eina ferð um mánaðin. Nærri reglur um vanligar fundir skulu vera ásettar í fundarskipanini. Almannakunngjørt skal verða við ársbyrjan, nær og hvar vanligir kommunustýrisfundir verða hildnir.
Stk. 2. Kommunustýrið hevur eykafund, tá ið borgarstjórin heldur tað vera neyðugt, ella um 1/3 av kommunustýrislimunum krevja tað. Borgarstjórin ger av, nær og hvar eykafundir verða hildnir. Avgerð um eykafund skal verða almannakunngjørd, um høvi er til tess.

**Fíggjarligar avleiðingar: -**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið býráðnum til støðutakan.

<u>**Fíggjarnevndin 21. november 2022:**</u>
Einmælt samtykt at beina málið í býráðið

<u>**Býráðið 29. december 2022:**</u>
Einmælt samtykt at býráðsfundir verða samb. tilmælið hjá kommunustjóra.

**80/22**
**22/00470-2 Umsókn um stuðul til nýggjárshald 2022/2023 (Nýggjársnevndin)**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 13.12.2022 | 104/22 |
| 2 Fíggjarnevndin | 19.12.2022 | 124/22 |
| 3 Býráðið | 29.12.2022 | 80/22 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 08.12.2022**
Til umrøðu er umsókn um stuðul frá Tvøroyrar Nýggjársnevnd v./ Signar Strøm at skipa fyri nýggjárshaldið, har upplýst verður, at stuðulin skal brúkast til keyp av fýrverk og annað ísamb. arb. hjá Tvøroyrar Nýggjársnevnd

Kommunustjórin mælir til at:
Tvøroyrar Kommuna heitur á Tvøroyrar Nýggjársnevnd um at fyriskipa nýggjárshald 2022/2023 vegna Tvøroyrar kommunu. At veita nýggjársnevndini eina stuðulsupphædd at fyriskipa nýggjárshaldið, har nýggjársnevndin fyrireikar øll viðurskiftir kring nýggjárshaldið, í samráð við ásetingar og krøv frá átaksleiðaranum. At kommuna ikki eftirfylgjandi ber annan kostnað av nýggjárshaldinum.

**Lógargrundarlag: Kommunusfulltrúin**

**Fíggjarligar avleiðingar: FÆ2022, §5.24.14 Stuðul til ítróttar- og mentanarmál**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið Mentanarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Mentanarnevndin 13. december 2022:**
Einmælt samtykt at heita á nýggjársnevndina at skipa fyri nýggjárshaldið vegna Tvøroyrar kommunu, og lata stuðul á kr. 50.000,- -málið verður beint í býráð.....

**Fíggjarnevndin 19. december 2022:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá mentanarnevndini, og at Tvøroyrar Kommuna umframt ber kostnaðin av felags morgunmati á Seglloftinum 31. des. 2022, har nýggjarsnevndin útvegar fólk at samskipa tiltakið, ið Tvøroyrar kommuna setur persón at standa fyri morgunmatinum.

**Býráðið 29. december 2022:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá Fíggjarnevndini.

**81/22**
**22/00437-2 TB-Flogbóltur umsókn um stuðul 2022**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 13.12.2022 | 106/22 |
| 2 Fíggjarnevndin | 19.12.2022 | 121/22 |
| 3 Býráðið | 29.12.2022 | 81/22 |

**Málslýsing:**
Umsitingin hevur móttikið umsókn um stuðul frá TB-Flogbóti til kappingarárið 2022/2023.

Upplýsast kann at TB-Flogbóltur hevur fingið í stuðul frá Tvøroyrar kommunu sum niðanfyri:

- 2019 kr. 110.000,-
- 2020 kr. 130.000,-
- 2021 kr. 130.000,-

Ongir játtan er avsett beinleiðis til TB-flogbólt á FÆ2022. Tó er avsett á FÆ2020 §524 (Stuðul til ítrótt kr. 800.000.-)

**Lógargrundarlag: Kommunufulltrúin**

**Fíggjarligar avleiðingar:** FÆ2022, 524 20. Stuðul til ítrótt

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið Mentanarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Mentanarnevndin 13. december 2022:**
Einmælt samtykt at lata stuðul á kr. 130.000,- -málið verður beint í býráði umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 19. december 2022:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá mentanarnevndini at lata stuðul á kr. 130.000,- til TB-flogbólt.

**Býráðið 29. december 2022:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá Fíggjarnevndini.

**82/22**
**22/00458-7 Umbøn at keypa lendi frá kommununi á Børkugøtu- Ragnar Joensen**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 19.12.2022 | 125/22 |
| 2 Býráðið | 29.12.2022 | 82/22 |

**Málslýsing:**
Ragnar Joensen og Helga Eyðunsdóttir Kjærbo hava søkt um byggiloyvi til um- og uppíbygging av sethúsunum á matr. nr. 144af í Trongisvági - Børkugøta 13.

Men teirra ætlaða bygging er ov stór til grundstykkið, sum er 490 m2.
Tað er gjørligt at gera eina marknaumskipan, soleiðis at tey fáa 196 m2 frá matr. nr. 144as og 21 m2 frá matr. nr. 144q. Hetta lendi skulu tey keypa frá kommununi.



**Lógargrundarlag:** Kommunufulltrú

**Fíggjarligar avleiðingar:** Uppskot: 100kr/m2 = 21.700 kr

**Tilmæli:** At selja teimum lendið og fremja marknaumskipan

**Fíggjarnevndin 19. december 2022:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá teknisku deild, at selja fyri kr. 100,-/m2 matr.nr 144 as á 196m2 og geil matr. nr. 144q á uml. 21m2, ið er eystanfyri matr. nr. 144af, til verandi eigara av matr.nr. 144af við at fremja marknaumskipan. Keyparin ber kostnaðin av marknaumskipan, tinglýsing v.m.

**Býráðið 29. december 2022:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá Fíggjarnevndini.

**83/22**
**21/00422-4 Brúgvagjøld dagførast**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Vinnu- og havnanevndin | 24.10.2022 | 32/22 |
| 2 Figgjarnevndin | 21.11.2022 | 115/22 |
| 3 Býráðið | 29.12.2022 | 83/22 |

**Málslýsing:**
Uppskot er komið frá Tvøroyrar Havn.

**Tilmælið:**
Uppskot frá Tvøroyrar Havn.

**Vinnu- og havnanevndin 24. oktober 2022:**
Nevndin mælir til at hækka gjøldini, og at nýta breidd sum grundarlag.
Gjald kr/ pr. ár:
Stig 1 (160> 199cm): 1000 kr
Stig 2 (200>229 cm): 1500 kr
Stig 3 (230>259 cm): 2000 kr
Stig 4 (260>289 cm): 2500 kr
Stig 5 (290 cm >): 3000 kr

Bátar á landi: ókeypis 18 dagar, hareftir 30 kr um dagin. Skal báturin liggja fast er tað sum minsta gjald í hylinum stig 1.
Málið verður beint í figgjarnevndina.

**Figgjarnevndin 21. november 2022:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá Vinnu- og havnanevndin. Málið verður beint í býráðið.

**Býráðið 29. december 2022:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá Figgjarnevndini við tí broyting, at bátar á landi gjalda kr. 30,- pr. dag frá 18. degi. Nýggja gjaldskráin verður sett virkin eftir at ígongdverandi dagføringarnar á bátahylin eru liðnar í 2023.

**84/22**
**22/00340-1 Kommunusamanlegging**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 06.09.2022 | 56/22 |
| 2 Býráðið | 29.09.2022 | 32/22 |
| 3 Býráðið | 29.12.2022 | 84/22 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 03. sept. 2022**
Borgarstjórin Kristin Michelsen ynskir at leggja mál fyri Tvøroyrar býráð, at fáa heimila og taka stig til, at Tvøroyrar býráð heitur á hvørja einstøku kommunu í Suðuroynni um at velja limir í ein arbeiðsbólk, at viðgerða sjálvbodna kommunusamanlegging í Suðuroynni.

Mælt verður til at limirnir í bólkinum eru óheftir politiskt, at arbeiðsbólkurin skipar seg sjálvan, og fær heimild at ráðføra seg uttanhýsis. Tilmælið um arbeiðssetning hjá bólkinum er, at hesin fremur eina lýsing av hvørjari kommunu sær, við m.a. lýsing av fyrimunum og vansum við kommunusamanlegging í Suðuroynni. Arbeisbólkurin orðar eina niðurstøðu, ið verður løgt til støðutakan hjá hvørjari kommunu sær innan 31.12.2023.

**Lógargrundarlag:**
- Løgtingslóg um kommunustýri, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 57 frá 30. apríl 2018
- Løgtingslóg nr. 12 frá 22. februar 2007 um sjálvbodnar kommunusamanleggingar og kommunal samstørv í sambandi við lógarbundnar uppgávur

**Tilgongd frammanundan:**
Samanlegging av kommununum í Suðuroynni hevur verið viðgjørd politiskt í 20-25 ár, uttan at nøkur samanlegging er framd. Løgtingið hevur í fleiri umførum viðgjørt spurningin um kommunusamanlegging, har ímillum at tvinga kommunur at leggja saman við lóg, men enn er ikki meiriluti fyri hesum í løgtinginum.
Fleiri kommunusamanleggingar eru tó framdar higartil aðrastaðni í landinum, og felags fyri tær samanlegging eru, at hesar eru gjørdar á sjálvbodnum grundarlag. Tí hevur tað verið upp til kommunurnar at gera av og til landsstýrið at góðkenna einstøku samanleggingarnar.

Fólkaatkvøða hevur verði í fleiri føru um kommunusamanlegging, og seinast hósdagin 3. mai 2012, har yvirornaða úrsliti var, at Suðuroyingar ynskja kommunusamanlegging, spurningurin er bert hvussu og nær. Nú eru so 10 ár liðin síðan fólkaatkvøðuna, og enn er onki stig tikið til kommunusamanlegging.

Hví samanlegging?
Tað eru nógvar góðar grundir til at skipa samfelagið við stórum og sterkum kommunalum eindum. Tað snýr seg um at hava búskaparliga og umsitingarliga burðardyggar eindir, sum kunnu geva borgarunum bestu tænasturnar og best møguligt røkja uppgávurnar í nærumhvørvinum.

Krøvini hjá borgarunum eru alsamt vaksandi, og borgarin velur tað øki ella kommunu, har tað er best at liva og virka - búskaparliga og sosialt. Kommunurnar kappast sína millum um skattaborgarar, og smærri kommunurnar hava nógv truplari við at lúka vaksandi krøv, halda fast við og draga at sær fólk.

Eygleiðingin er, at lokala fólkaræðið í Suðuroynni er veikt mótvegis Miðstaðarøkinum, og ungaættarliði velur Suðuroynna frá. Kappingin millum kommunurnar í Suðuroynni, um skattaborgarar ótti heldur verði at fáa skattaborgarar til Suðuroynni uttan mun hvar í Suðuroynni hesir veja at seta búgv.

Metingin at fáa eitt demokrati at virka nøktandi, er neyðugt við einum ávísum størri fólkagrundarlagi í einari eind. Hetta vil skapa dynamikk og virka mennandi á fólkaræði. Fleiri fólk fáa høvi at taka lut og fáa ávirkan á viðurskiftini í lokaløkinum, og veljarin fær fleiri valevnir at velja ímillum í einari størri kommunalari eind.

Tað rokkur ikki á mál við bara betri infraskipan og sjálvbodnum óformligum samstarvi. Kommunusamanlegging og økismenning er við til at skapa betri grundarlag fyri vinnuligum virksemi og búskaparvøkstri, sum aftur minkar um arbeiðsloysið og harvið skapar fólkavøkstur.

Við verandi samanbinding av við tunlum og vegum eru tað spill av tilfeingi, at gjørdar verða stórar íløgur í anlegg av ymiskum slag í kommunum, sum liggja lið um lið - dupultíløgur. Við størri kommunalum eindum kunnu gerast færri og meira dygdargóð anlegg. Harumframt kunnu eindirnar gera nýggjar íløgur, sum tær annars ikki megnaðu at gera hvør sær.

**Granskingardepilin fyri Økismenning gjørdi ein kanning í 2004, ið nevndis:**
«Kommunusamanlegging - hvat siga suðringar? Status quo, kommunusamanlegging ella økt samstarv»?

*Hendan kanningin vísti, at ein meiriluti av suðringum ynskja kommunusamanlegging. Tað eru nógv, ið halda at kommunusamanlegging fer at hava fyrimunir við sær. Fyrst og fremst vænta næstan øll, at kommunusamanlegging fer at hava við sær, at oyggin fer at standa sterkari út-at-til, og at samanhaldi millum bygdirnar í oynni verður betri. Hetta kann tulkast sum, at nógvir suðringar eru troyttir av tí bygdaklandrinum, sum eisini er ein partur av veruleikanum í Suðuroynni. Stórur partur av teimum sum stuðla kommunusamanlegginum vænta eisini, at samanlegging fer at hava við sær betri og effektivari kommunalar tænastur. Um 80 % halda antin, at kommunusamanlegging eigur at fara fram sum skjótast ella at tað skal vera við kommunuvalið í 2008.*

*Kanningin vísti at 490 av teimum 502 sum luttóku í kanningini svaraðu uppá spurningin um teirra kommuna skal leggja saman við aðrari kommunu. Ein stórur meiriluti av hesum – heili 73,9 % - svaraðu ja, at tey hildu, at teirra kommuna eigur at leggja saman við eini aðrari kommunu. 15,5 % svaraðu nei, at teirra kommuna skuldi ikki taka lut í eini kommunusamanlegging, meðan 10,6 % søgdu seg ikki vita.*

*Um hugt verður at hvussu fólk í teimum einstøku kommununum hava svarað, so er ein greiður meiriluti fyri kommunusamanlegging í øllum kommununum í oynni. Serliga í Tvøroyrar kommunu eru borgararnir positivir um eina kommunusamanlegging – har eru heili 82 % fyri eini kommunusamanlegging. Í Vágs kommunu eru út við 70 % fyri eini kommunusamanlegging, og eru tølini fyri tær smærri kommunurnar nakulunda tey somu. Í Hvalbiar kommunu, har stuðulin til eina kommunusamanlegging var minstur, søgdu umleið 60 % seg vera fyri eini kommunusamanlegging. Ein týðandi spurningur í kjakinum um kommunusamanlegging í Suðuroynni er spurningurin um, hvussu nógvar kommunu skulu verða í oynni. Kanningin vísti, at millum tey, ið halda at kommunurnar skulu leggja saman, var meiriluti fyri, at tær løgdu saman til 1 kommunu. Umleið 57 % hildu, at ein kommuna skal vera í Suðuroynni, meðan um 40 % hildu, at tvær kommunur skulu verða í oynni.*

**Fíggjarligar avleiðingar: ókent**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið býráðnum til støðutakan.

**<u>Býráðið 06. september 2022:</u>**
Kristin Michelsen, borgarstjóri mælir til at Tvøroyrar býráð samtykkir fyriliggjandi uppskot og at býráðið heimilar borgarstjóranum at hava fund við allar borgarstjórar í Suðuroynni at viðgerða uppskotið.
Einmælt samtykt

**<u>Kommunustjórin 25.09.2022:</u>**
Fundur var á Hamragarði hin 21. September 2022, kl. 18.30, har allir borgarstjórar og kommunuskrivarar møttu.

**Niðurstøðan á fundinum:**

1. Full semja var millum allar borgarstjórar, at hesir hvør í sær leggja uppskotið fyri teirra kommunustýrið, hvørt kommunan ynskir at vera umboðað í arbeiðsbólki, ið skal lýsa fyrimunir og vansar við kommunusamanlegging í Suðuroynna.

2. Og um kommunustýrið tekur undir við uppskotinum, velur hvørt kommunustýrið sær <u>eitt</u> umboð í arbeiðsbólkin, sum fær til uppgávu at lýsa fyrimunir og vansar við sjálvbodnari kommunusamanlegging.

   Kristin Michelsen mælti til, at raksturin av arbeiðsbólkurin verður fíggjaður eftir sama býtislyklið, sum er galdandi fyri BHS. Hetta var breið semja um, treyta av at kommunustýrið samtykti uppskotið.

**<u>Býráðið 29. september 2022:</u>**
Málið var umrøtt og kunnað. Einmælt samtykt, at málið verður tikið upp aftur á einum seinni fundi, eftir

- 
- 

**Býráðið 29. december 2022:**

Kristin Michelsen mælir til, at býráðið á Tværoyri á fyrst komandi býráðsfundi velur 2 limir í arbeiðsbólk at lýsa fyrimunir og vansar við kommunusamanlegging og valið fer fram eftir lutfallsvalháttinum. Eisini verður mælt til, at Hvalbiar Kommuna og Fámjins kommuna verða umboðaðar við 2 limum hvør í arbeiðsbólkinum. Einmælt samtykt.

**85/22**
**21/00577-2 Flutning av mors**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 25.10.2021 | 58/21 |
| 2 Fíggjarnevndin | 19.12.2022 | 122/22 |
| 3 Býráðið | 29.12.2022 | 85/22 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 20.10.2021**
Umsitingin hevur móttikið eina áheitan -umvegis átaksleiðaran- frá leiðaranum av sjúkraflutingstænastuni Hjalgrim Andreasen, ið heitur á kommununa um at átaka sær flutningin av mors, sum ambulansatænastan annars tekur sær av.

Sagt verður, at tað hóskar seg ikki at ambulansan verður brúktur til at koyra mors. Nevnt verður at norðan fyri eru tað vanl. sløkkiliðini, ið taka sær av hesum.

**Lógargrundarlag:**

**Fíggjarligar avleiðingar: F/Æ2022**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Fíggjarnevndin 25. oktober 2021:**
Einmælt samtykt at umsitingin heitur á leiðaran av ambulansutænastuni at møta á fundi.

**Kommunustjórin 01.12.2022:**
Eftir fund við sløkkiliðini í Suðuroynni, at Ambulansatænastan, hevur leiðarin av tilbúgvingini hjá Tvøroyrar Kommunu móttikið enn eina áheitan frá leiðaranum av Ambulansatænastuni hjá Suðuroyar Sjúkrahús, har heitt verður á sløkkilið, um at átaka sær fluttning av mors, heldur enn hetta framhaldandi er ein tænasta, sum Ambulansatænastan á Suðuroyar Sjúkrahús tekur sær av.

Orsøkin til at Ambulansatænastan ynskir at kommunan yvirtekur flutnings tænastuna er, at tað ikki er í trá við leiðreglurnar hvat ein sjúkrabilur skal brúkast til. Sagt verður, at tað er óetiskt skeivt at koyra mors og sjúklingar í sama bil.

Leiðarin av ambulansatænastuni upplýsir í skrivinum, at nú Ambulansatænastan hevur tikið avgerð um lata hesa tænastuna víðari til sløkkiliðini í Suðuroy, er Ambulansatænastan sinnað at lata sløkkiliðnum gamla sjúkrabilin - ein VW Transporter frá 2003- til hesa tænastuna.

Ambulansatænastan mettur at talan er um 3-5 flutningar um árí, sagt verður at norðanfyri verður henda sama tænastan veitt av sløkkiliðunum.

**Kommunustjórin hevur niðanfyri viðmerking/tilmæli:**
Kommunustjórin er ivasamur í at broyta verandi flutningsskipan. Talan um mál, har tað er sera umráðandi at sýna allarstørstu virðing, og krevur hetta tí størsta umhugsni og varðsemi, áðrenn broyting verður framd.

M.a. kann upplýsast at Heilsuverkið HSV skriva á teirra heimasíðu, at HSV hevur eina Missión, ið nevnist "Dygdargóð heilsutænasta alt lívið". Har ið sagt verður at "Sjúkrahúsverkið veitir heilsutænastur, ið fevna frá gitnaði til seinastu fráferð" og "Málið er dygdargóðar heilsutænastur, bornar av vitan og tænastusinni"

Og sigast má, at júst henda missión hjá "Sjúkrahúsverkinum, at veitir heilsutænastur til seinastu fráferð" hevur Tvøroyrar Kommuna tikið til eftirtektar, og skipar fyri virðuligum flutningi úr kapellinum á heilsuverkinum í tíðarhóskandi líkbili til seinasta hvíldarstað á fold.

Kommunan er ikki vitandi um annað enn, at henda flutings tænasta virkar sum hon skal. Og Kommunustjórin er ivasamur í, hvørt starvsfólk í sløkkiliðnum í Suðuroynni hava nógv nógvar royndir at átaka sær slíkar seruppgávur; um tey eru nógv væl ílatin og hava nógv stóran autoritet og tignað, ið krevst til slíkan flutning.

Leiðarin av ambulansatænastuni leggur upp til, at mors flutningurin kann fara fram í einum 20 ára gomlum bili. Aftur her kunna sannlíkt henda støður henda, sum kunna krevja eyka nógv av brunaliðnum, ið tey ikki eru fyrireika uppá. Eisini havandi í huga, at talan sannlíkt er um fluttning millum Suðuroynna og Tórshavn, ið er tí talan um ein flutningstænastu, sum tekur langa tíð.

Í Tórshavn er talan um sløkkiliðsfólk, sum burtur av starvast innan tilbúgving, tað er ikki støðan í Suðuroynni.

Kommunustjórin mælir heldur til at varðveita verðandi skiljulinjuna. Tvs. at Sjúkrahúsverkið framhaldandi átekur sær allan flutningin til øll viðurskiftir eru avgreidd kring deyðsfallið; og Kommunan veitur flutningstænastuna úr kapellinum í líkbilinum til seinasta hvíldarstaði.

Um her er talan er um ein kostnaða, sum heilsuverkið ynskir at sleppa undan, er hetta nakað sum partanir kunna viðgerða.

**Fíggjarnevndin 19. december 2022:**
Einmælt samtykt at Tvøroyrar Kommuna ikki átekur sær fluting av mors samb. áheitan hjá leiðaranum á ambulansatænastuni.

**Býráðið 29. december 2022:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá Fíggjarnevndini.

**86/22**
**22/00438-3 BHS -Fíggjarætlan 2023 fyri Bú- og Heimatænastuna**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 21.11.2022 | 116/22 |
| 2 Sosiala nevnd | 13.12.2022 | 29/22 |
| 3 Fíggjarnevndin | 19.12.2022 | 123/22 |
| 4 Býráðið | 29.12.2022 | 86/22 |

**Málslýsing:** Leiðslan fyri Bú- og heimatænastuna hevur gjørt fíggjarætlan fyri 2023, at leggja fyri kommunustýrini áðrenn stýrisfundin 29. nov.

**Fíggjarætlan fyri 2023**

| Heiti | Ætlan 2023 (Framrok) | Fíggjarætlan 2023 |
|---|---|---|
| Lønir v.m. | 58.167.192 | 58.067.192 |
| Keyp av vørum og tænastum | 6.652.377 | 6.652.377 |
| Keyp av útbúnaði, netto | 250.000 | 250.000 |
| Leiga, viðlíkahald og skattur | 926.151 | 950.151 |
| Ymsar rakstrarútreiðslur | 71.000 | 100.000 |
| Søla av vørum og tænastum | -5.400.000 | -6.950.000 |
| Tilskot til einstaklingar | 1.000.000 | 1.500.000 |
| Stuðul til annað virksemi | | |
| Innanh. flyt. millum almennar stovn. (útr) | 3.965.374 | 3.965.374 |
| Flyting til landið (komm) | 164.363 | 364.363 |
| Keyps-mvg | 369.600 | 369.600 |
| Flyting frá landinum (komm) | 0 | 0 |
| **Í alt** | **66.166.057** | **65.269.057** |

*Hædd skal takast fyri, at kunngerðin um at hækka gjøldini og avtingarsamsýningina enn ikki er lýst.*

**Framrokning av afturberingini til kommunurnar í 2023**

| Stað | % | Afturbering | Gjald | Munur |
|---|---|---|---|---|
| Hvalba | 14% | 9.295.000 kr. | 9.137.668 kr. | 157.332 kr. |
| **Tvøroyri** | **36%** | **25.163.000 kr.** | **23.496.861 kr.** | **1.666.139 kr.** |
| Fámjin | 3% | 1.465.000 kr. | 1.958.072 kr. | -493.072 kr. |
| Hov | 2% | 1.491.000 kr. | 1.305.381 kr. | 185.619 kr. |
| Porkeri | 8% | 5.224.000 kr. | 5.221.525 kr. | 2.475 kr. |
| Vágur | 29% | 20.162.000 kr. | 18.928.027 kr. | 1.233.973 kr. |
| Sumba | 8% | 4.967.000 kr. | 5.221.525 kr. | -254.525 kr. |
| **Í alt** | **100%** | **67.767.000 kr.** | **65.269.057 kr.** | **2.497.943 kr.** |

**Lógargrundarlag:** Løgtingslóg nr. 20 frá 7. apríl 2014 um kommunalt samstarv um heimatænastu, eldrarøkt v.m.

**Fíggjarligar avleiðingar: Avsetingar á FÆ2023**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið sosialu nevnd og býráðnum til støðutakan umvegis fíggjarnevndina.

__**Fíggjarnevndin 21. november 2022:**__
Einmælt samtykt at beina málið í sosialu nevnd

__**Sosiala nevnd 14. december 2022:**__
Einmælt samtykt áheitan á leiðsluna í BHS um at uppsetanin av fíggjarætlan fyri ári, inniheldur samberligtøl fyri undanfarin ár. Sosiala nevnd heitur á stýrið um at kalla inn fíggjarleiðara hjá Tvøroyrar kommunu til fund, tá fíggjarviðurskiftir verða viðgjørdir í stýrinum. Hetta er frammanundan samtykt av Tvøroyrar býráð.

__**Fíggjarnevndin 19. december 2022:**__
Einmælt samtykt tilmælið hjá sosialu nevnd og at øll afturberingin hjá Tvøroyrar kommuna verður játta til eldrasamstarvið, hetta treyta av, at allar kommunur í Suðuroynni gera hetta sama.

__**Býráðið 29. december 2022:**__
Einmælt samtykt tilmælið hjá sosialu nevnd og fíggjar nevndini, at øll afturberingin hjá Tvøroyrar kommuna verður játta til eldrasamstarvið, hetta treyta av, at allar kommunur í Suðuroynni gera hetta sama.

**87/22**
**22/00138-1 Ítróttarhølllin -dagføringar/umvælingar av gólvinum í ítróttarhøllini 2022**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 08.03.2022 | 21/22 |
| 2 Mentanarnevndin | 05.04.2022 | 41/22 |
| 3 Mentanarnevndin | 25.08.2022 | 66/22 |
| 4 Fíggjarnevndin | 05.09.2022 | 83/22 |
| 5 Býráðið | 06.09.2022 | 53/22 |
| 6 Mentanarnevndin | 14.09.2022 | 76/22 |
| 7 Fíggjarnevndin | 22.09.2022 | 91/22 |
| 8 Býráðið | 29.09.2022 | 58/22 |
| 9 Býráðið | 29.12.2022 | 87/22 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 5. Mars 2022**
Umsjónarmaðurin ítróttarhøllini hevur vent seg til kommunustjóran og forkv. í mentanarnevndini við kunning og áheitan um, at neyðugt er at dagføra/umvæla gólvið inni í Ítróttarhøllini.

**Lógargrundarlag: Kommunufulltrúin**

**Fíggjarligar avleiðingar:** Játtan á 400tkr. er avsett á FÆ2022, §533 til gólv í Ítróttarhøllini.

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið mentanarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Mentanarnevndin 08. marts 2022:**
Einmælt samtykt at dagføra gólv í ítróttarhøllini. Tekniskileiðarin kannar kostnaðin og innheintar tilboð, áðrenn arbeiði verður sett í gongd. Málið verður á skrá aftur til komandi fund í Mentanarnevndini

**Mentanarnevndin 05. apríl 2022:**
Einmælt samtykt at seta arbeiði í gongd innan fyri játtanina á FÆ2022

**Kommunustjórin 5. juli 2022**
Samb. Fráboðan frá veitara verður kostnaðurin at umvæla gólvið í ítróttarhøllini kr. 512.750,- ex. MVG. Avsett á FÆ2022 eru kr. 400.000,-

**Kommunustjórin 04.08.2022**
Tilboð er móttikið frá nýggjum veitara, har kostnaðurin at umvæla gólvið í ítróttarhøllini kr. 428.150,- ex. MVG. Avsett á FÆ2022 eru kr. 400.000,-

Íroknað hesum tilboði eru eykakostnaður:

- kr. 22.500,- fyri nýggj alu. mál
- Kr. 10.000,-flogbótsvøllur í øðrum liti
- Kr. 20.500,- fyri ferð og gisting.

Ikki við í tilboðnum er kostnaðurin av at flyta tilfari til Føroyar. *«Prisen er ekskl. Moms og afgifter på Færoerne. Materialer leveres til angivet speditør i Danmark»*

**Mentanarnevndin 25. august 2022:**
Einmælt samtykt at taka av tilboðnum uppá kr. 428.150,- ex. MVG.
Meirkostnaður verður fíggjaður av játtanini hjá Mentanarnevndini.

**Fíggjarnevndin 05. september 2022:**
Nevndin er kunnað um, at Kim Thomasen nú mælir til, atarbeiðið verður útsett til 2023, og at tað tískil ikki er neyðugt at fáa eykajáttan í 2022.
Málið verður beint aftur í Mentanarnevndina.

**Býráðið 06. september 2022:**
Málið er tikið av skrá og verður viðgjørt aftur í Mentanarnevndini ný nýggir upplýsingar fyriliggja.

**Mentanarnevndin 14. september 2022:**
Einmælt samtykt ikki at skifta gólv í inniverandi ári, orakað av at hetta kemur at órógva venjingar í høllini. Mælt verður til, at játtanin ístaðin verður avsett til útskiftan av orkusparandi hitaketlum í Ítróttarhøllini í inniverandi ári. –málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 22. september 2022:**
Einmælt samtykt at játtanin verður flutt til útskiftan av oljuketlum. Málið verður beint í býráðið.

**Býráðið 29. september 2022:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá fíggjarnevndini

**Kommunustjórin 05.12.2022**
Onnur viðgerð av býráðssamtykt at flyta játtan til útskiftan av orkusparandi hitaketlum.

**Býráðið 29. december 2022:**
Einmælt samtykt við aðru viðgerð

88/22

22/00305-2 Keyp av flishøggara til ruskplássið

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 19.09.2022 | 38/22 |
| 2 Fíggjarnevndin | 22.09.2022 | 92/22 |
| 3 Fíggjarnevndin | 21.11.2022 | 112/22 |
| 4 Býráðið | 29.12.2022 | 88/22 |

**Málslýsing:**
Flishøggarin er keyptur.

**Lógargrundarlag:**

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmælið:**

**Tekniska nevnd 19. september 2022:**
Nevndin er kunnað um, at flishøggarin er keyptur og leveraður.

**Fíggjarnevndin 22. september 2022:**
Fíggjarnevndi eftirlýsir upplýsing um kostnaðin av flisamaskinu. Avsett eru á FÆ2022 kr. 50.000,- til flismaskinu. Málið verður tikið upp aftur á einum seinni fundi.

**Kommunustjórin 08.11.2022:**
Kostnaðurin av flísamaskinu/kvørn er kr. 210.000,- ex. Mvg.
Mælt verður til at hesin verður bókaður á §711 løga bingjupláss, har avsett eru FÆ2022, kr. 495tkr.

**Fíggjarnevndin 21. november 2022:**
Einmælt samtykt at keypa flisahøggara og at hesin verður fíggjaður av §711 løga bingjupláss, har avsett eru FÆ2022, kr. 495tkr.

**Býráðið 29. december 2022:**
Einmælt samtykt

**89/22**
**22/00411-1 Eykajáttanir -flyting millum íløgu og rakstrarstøð FÆ2022**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 21.11.2022 | 113/22 |
| 2 Býráðið | 22.11.2022 | 74/22 |
| 3 Býráðið | 29.12.2022 | 89/22 |

**Málslýsing: (Kommunustjórin 19.11.2022)**
Fíggjardeildin hevur pr. medio nov. gjørt upp yvirlit yvir játtanir FÆ2022 og realisera kostnað á rakstrarstøðum. Avgjørt hevur verði at fremja umraðfestingar í avsetingunum til løgur og rakstur og er tí neyðugt við flytan av játtan á rakstrarstøðum. Neyðugt hevur verði við hægri rakstrarjáttan á einkultum rakstrarstøðum, eins og minni nýtsla hevur verði á summum rakstrarstøðum. Eykajáttanirnar eru metingar hjá fíggjarleiðara og kommunustjóra og eru grundaðar á fyriliggjandi 10. mnð. uppgerðum.

Samanumtikið verða allar umraðfestingar játtaðar innan fyri samarakstarstað.

| Rakstrarstað | Meir nýtsla | Viðmerking |
|---|---|---|
| §1 Kommunalafyrisitingin | -196.000,- | Fíggja við umraðfesting innan §1 |
| §2 Almanna og heilsumál | -500.000,- | Fíggja við umraðfesting innan §2 |
| §3 Børn og ung | -30.000,- | Fíggja við umraðfesting innan §2 |
| §4 Undirvísing | -600.000,- | Fíggja av løgum §4 |
| §5 Mentan og frítíð | -425.000,- | Fíggja av løgum §5 |
| §6 Teknisk mál | -5.275.000,- | Fíggja av løgum §6 |
| §7 Umhvørvi | -490.000,- | Fíggja av løgum §7 |
| §8 Rentuútreiðslur | -180.000,- | Fíggja av P/F skatti §8 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Til | 230 | Eldrarøkt | 500.000,00 |
| Frá | 210 | Kommunulæknar | -100.000,00 |
| Frá | 214 | Barnatannrøkt | -50.000,00 |
| Frá | 218 | Barnaverndin | -350.000,00 |
| | | | -500.000,00 |
| | | Munur | 0,00 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Til | 314 | Ung í arbeiði | 30.000,00 |
| Frá | 312 | Frítíðarskúlin | -30.000,00 |
| | | Munur | 0,00 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Til | 418 | Eftirskúlin | 600.000,00 |
| | | | |
| Frá | 411 | Skúlin | -600.000,00 |
| | | Munur | 0,00 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Til | 510 | Musikkskúlin | 40.000,00 |
| Til | 512 | Kvøldskúlin | 250.000,00 |
| Til | 530 | Svimjihøllin | 100.000,00 |
| Til | 536 | Ítróttardepilin | 35.000,00 |
| | | | 425.000,00 |
| | | | |
| Frá | 533 | Ítróttarhøllin | -300.000,00 |
| Frá | 537 | Við Stórá | -125.000,00 |
| | | | -425.000,00 |
| | | Munur | 0,00 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Til | 612 | Ídnaðarøkir | 115.000,00 |
| Til | 613 | Ídnaðarøkir | 80.000,00 |
| Til | 620 | Umhvørvistiltøk | 40.000,00 |
| Til | 634 | Gøtur | 70.000,00 |
| Til | 618 | Kirkjugarð | 110.000,00 |
| Til | 624 | Vegir | 460.000,00 |
| Til | 625 | Vegir | 4.400.000,00 |
| | | | 5.275.000,00 |
| | | | |
| Frá | 609 | Bygningar | -4.000.000,00 |
| Frá | 619 | Kirkjugarð | -1.275.000,00 |
| | | | -5.275.000,00 |
| | | Munur | 0,00 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Til | 714 | Sløkkiliðið | 350.000,00 |
| Til | 715 | Sløkkiliðið | 140.000,00 |
| | | | 490.000,00 |
| | | | |
| Frá | 719 | Tvøroyrar Havn | -490.000,00 |
| | | Munur | 0,00 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Til | 820 | Rentuútreiðslur | 180.000,00 |
| | | | |
| Frá | 834 | P/F Skattur | -180.000,00 |
| | | Munur | 0,00 |

Mælt verður til at fíggja meirnýtsluna við flytingum innan hvørja grein sær. Málið skal hava tvinnar viðgerðir í býráðnu

**Lógargrundarlag: Kommunustýrislógin**

**Fíggjarligar avleiðingar:** FÆ2022 -flytan millum íløgu og rakstarjáttanir

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndini og býráðnum til støðutakan.

**<u>Fíggjarnevndin 21. november 2022:</u>**
Fíggjarnevndin samtykkir einmælt fyriliggjandi uppskot og beinir málið í býráðið.

**<u>Býráðið 22. november 2022:</u>**
Einmælt samtykt til fyrru viðgerð –verður beint í býráðið til seinnu viðgerð í desember

**<u>Kommunustjórin 27.12.2022.</u>**
Fíggjarleiðarin hevur pr. 27. desember 2022 gjørt upp rakstur og løgur.

Mælt verður býráðnum til at samtykkja eykajáttn við aðruviðgerð samb niðanfyri uppgerð. Øll móttikin skjøl fyri desember eru bókaðið, men ikki gramnskoða. Samanumtikið verða allar umraðfestingar játtaðar innan fyri samarakstarstað.

Eykajáttanir í 2022

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Til | 126 | Býráðið | Lønir | 60.000,00 |
| Til | 112 | Val | Fólkatings- og løgtingsval | 110.000,00 |
| Til | 128 | Trivnaðardeild | Løn, skrivstovuútbúnaður | 50.000,00 |
| Til | 116 | Kommunufelagið | Limagjald | 3.600,00 |
| | | | | 223.600,00 |
| Frá | 114 | Fyrisitingin | Minni løn | -223.600,00 |
| Til | 230 | Eldrarøkt | Bú- og Heimatænastan | 500.000,00 |
| Til | 228 | Eldrafimleikur | Løn | 20.000,00 |
| | | | | 520.000,00 |
| Frá | 210 | Kommunulæknar | Minni løn | -100.000,00 |
| Frá | 218 | Barnaverndin | Minni løn, Minni leiga | -420.000,00 |
| | | | | -520.000,00 |
| Til | 314 | Ung í arbeiði | Meira løn | 30.000,00 |
| Frá | 312 | Frítíðarskúlin | Minni løn | -30.000,00 |
| Til | 410 | Skúlin | Meiri olja | 500.000,00 |
| Til | 418 | Eftirskúlin | Meira stuðul | 600.000,00 |
| | | | | 1.050.000,00 |
| Frá | 411 | Skúlin | Minni íløga | -1.100.000,00 |
| Til | 510 | Musikkskúlin | Meira løn, keyp | 80.000,00 |
| Til | 512 | Kvøldskúlin | Meira løn | 330.000,00 |
| Til | 530 | Svimjihøllin | Meira løn | 150.000,00 |
| Til | 536 | Ítróttardepilin | Meira umvæling | 35.000,00 |
| | | | | 595.000,00 |
| Frá | 533 | Ítróttarhøllin | Minni íløga | -300.000,00 |
| Frá | 537 | Við Stórá | Minni íløga | -295.000,00 |
| | | | | -595.000,00 |
| Til | 612 | Ídnaðarøkir | Minni leiga | 115.000,00 |
| Til | 613 | Ídnaðarøkir | Útvega íløga | 80.000,00 |
| Til | 620 | Vatnveiting | Meiri umvæling | 85.000,00 |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Til | 634 | Gøtur | Meira løn | 85.000,00 |
| Til | 618 | Kirkjugarð | Meira løn | 110.000,00 |
| Til | 624 | Vegir | Meira løn | 550.000,00 |
| Til | 625 | Vegir | Meira asfalt | 3.500.000,00 |
| Til | 627 | Gøtuljós | Meiri íløga | 30.000,00 |
| | | | | 4.555.000,00 |
| Frá | 609 | Bygningar | Minni íløga | -4.000.000,00 |
| Frá | 619 | Kirkjugarð | Minni íløga | -515.000,00 |
| | | | | -4.515.000,00 |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Til | 714 | Sløkkiliðið | Meira løn | 350.000,00 |
| Til | 715 | Sløkkiliðið | Bilur Hvalba | 140.000,00 |
| | | | | 490.000,00 |
| Frá | 719 | Tvøroyrar Havn | Minni íløga | -490.000,00 |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Til | 820 | Rentuútreiðslur | Meiri rentur | 180.000,00 |
| Frá | 834 | P/F Skattur | Meira skattur | -180.000,00 |

**Býráðið 29. december 2022:**
Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

**90/22**
**22/00129-1**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Sosiala nevnd | 08.03.2022 | 6/22 |
| 2 Fíggjarnevndin | 17.03.2022 | 33/22 |
| 3 Sosiala nevnd | 10.05.2022 | 9/22 |
| 4 Sosiala nevnd | 29.08.2022 | 14/22 |
| 5 Sosiala nevnd | 14.09.2022 | 16/22 |
| 6 Sosiala nevnd | 18.10.2022 | 25/22 |
| 7 Fíggjarnevndin | 20.10.2022 | 101/22 |
| 8 Sosiala nevnd | 16.11.2022 | 27/22 |
| 9 Býráðið | 29.12.2022 | 90/22 |

**Málslýsing: Kommunustjórin**

Sosiala nevnd 08. marts 2022:
Málið var umrøtt og kunnað.

Fíggjarnevndin 17. marts 2022:
Einmælt samtykt at útseta málið til ein seinni fund.

Sosiala nevnd 10. maj 2022:
Málið var umrøtt og kunnað.

Sosiala nevnd 29. august 2022:
Málið verður útsett til komandi fund.

Sosiala nevnd 14. september 2022:
Einmælt samtykt at lýsa eftir barnatannlækna í oktober til setan á sumri [illegible] og at hetta verður í samráð við verandi barnatannlækna. Hetta verður á umsitingina um at taka samskifti við [illegible] starvsfólkum í tannlæknastovuni við [illegible] so á hesi verða [illegible] heldur enn [illegible] hjá skúlanum.

Sosiala nevnd 18. oktober 2022:
Einmælt samtykt at søkja eftir tannlækna í oktober 2022.

Fíggjarnevndin 20. oktober 2022:
Málið verður kannað nærri og beint í býráðið.

Sosiala nevnd 16. november 2022:
Hetta verður á umsitingina [illegible] verandi tannlækna greið til komandi býráðsfund. Málið verður beint beinleiðis í býráðið.

Kommunustýrið 26. nov. 2022:
Virkandi tannlækni [illegible] hevur sent umsókn [illegible] nov. 2022 um lov at halda fram í starvinum. Samb. starvsfólkaskipan hjá Tvøroyrar Kommunu er galdandi at starvsfólk kunna [illegible] halda fram til tey eru fylt 72 ár.

Býráðið 29. december 2022:
Jónleif Jespersen [illegible] málið verður útsett til næsta fund. Einmælt samtykt.

Til kunningar

**46/22**
**22/00096-1 Skattatøl 2022**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 17.02.2022 | 2/22 |
| 2 Býráðið | 22.02.2022 | 5/22 |
| 3 Fíggjarnevndin | 17.03.2022 | 3/22 |
| 4 Býráðið | 30.03.2022 | 6/22 |
| 5 Fíggjarnevndin | 21.04.2022 | 5/22 |
| 6 Býráðið | 05.05.2022 | 11/22 |
| 7 Fíggjarnevndin | 18.05.2022 | 6/22 |
| 8 Býráðið | 31.05.2022 | 21/22 |
| 9 Fíggjarnevndin | 23.06.2022 | 9/22 |
| 10 Býráðið | 30.06.2022 | 26/22 |
| 11 Fíggjarnevndin | 05.09.2022 | 14/22 |
| 12 Býráðið | 06.09.2022 | 29/22 |
| 13 Fíggjarnevndin | 22.09.2022 | 15/22 |
| 14 Býráðið | 29.09.2022 | 31/22 |
| 15 Fíggjarnevndin | 20.10.2022 | 24/22 |
| 16 Býráðið | 24.10.2022 | 40/22 |
| 17 Fíggjarnevndin | 21.11.2022 | 25/22 |
| 18 Býráðið | 22.11.2022 | 45/22 |
| 19 Fíggjarnevndin | 19.12.2022 | 26/22 |
| 20 Býráðið | 29.12.2022 | 46/22 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 01.02.2022**
Til kunning og umrøðu samanbering av skattainntøkum 2021/2022

**Lógargrundarlag:** Kommunustýrislógin

**Fíggjarligar avleiðingar: FÆ2022/23**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður við hesum kunning um skattainntøkur latið fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til umrøðu/-støðutakan.

**<u>Fíggjarnevndin 17. februar 2022:</u>**
Málið var umrøtt og kunnað

**<u>Býráðið 22. februar 2022:</u>**
Málið var umrøtt og kunnað.

**<u>Fíggjarnevndin 17. marts 2022:</u>**
Málið var umrøtt og kunnað

**<u>Býráðið 30. marts 2022:</u>**
Málið var umrøtt og kunnað

**<u>Fíggjarnevndin 21. apríl 2022:</u>**
Málið var umrøtt og kunnað

**<u>Býráðið 05. maj 2022:</u>**
Málið var umrøtt og kunnað

**<u>Fíggjarnevndin 18. maj 2022:</u>**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 31. maj 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Fíggjarnevndin 23. juni 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**Býráðið 30. juni 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Fíggjarnevndin 05. september 2022:**
Nevndin er kunnað.

**Býráðið 06. september 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Fíggjarnevndin 22. september 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 29. september 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Fíggjarnevndin 20. oktober 2022:**
Málið var umrøtt og nevndin er kunnað

**Fíggjarnevndin 21. november 2022:**
Málið var umrøtt og nevndin er kunnað

**Býráðið 22. november 2022:**
Málið var umrøtt og nevndin er kunnað

**Fíggjarnevndin 19. december 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 29. december 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað

**47/22**

**22/00485-2 IRF -Kovrigjaldið hjá IRF hækkar 1. jan. 2023**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 19.12.2022 | 27/22 |
| 2 Býráðið | 29.12.2022 | 47/22 |

**Málslýsing: Kommunustjórin**
IRF -Kovrigjaldið hjá IRF hækkar 1. jan. 2023

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndini og býráðnum til støðutakan/kunning.

**Fíggjarnevndin 19. december 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 29. december 2022:**
Málið verður tikið upp á einum seinni fundi.

**48/22**
**22/00484-5 SEV -Fundarfrásøgn frá eykaaðalfundi des. 2022**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 29.12.2022 | 48/22 |

**Málslýsing:**
SEV -Fundarfrásøgn frá eykaaðalfundi des. 2022

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið býráðnum til støðutakan/kunning.

**Býráðið 29. december 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað

**49/22**
**22/00395-3 Samstarvsavtala um tilbúgving millum Tvøroyrar kommunu, Hvalbiar kommunu og Fámjins kommunu**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 24.10.2022 | 68/22 |
| 2 Býráðið | 29.12.2022 | 49/22 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 21.10.2022**
Samb. tilbúgvingarlógina §8, stk 2, verður uppskot til samstarvsavtal løgdt fyri bý- og bygdaráðum til samtyktar, ið eru komin ásamt um at skipa fyri felags tilbúgving í Tvøroyrar kommunu, Hvalbiar kommunu og Fámjin Kommunu.

Tvøroyrar býráð hevur hin 26. feb. 2020, samtykt einmælt tilmælið hjá brunanevndini, at bjóða Fámjin kommunu uppi samstarvsavtaluna millum Tvøroyrar og Hvalbiar kommunu. Hetta sama hevur Hvalbiar kommunu á bygdaráðsfundi hin 27.04.2020.

Arbeitt hevur verði við felagstilbúgving fyri samstarvið, og er henda send til Fiskimálaráðið, ið varðar av økinum tilbúgving til góðkenningar hin 5 nov. 2020. Svar er komið frá Fiskimálaráðnum 25. Juli 2022, við viðmerkingum, ið eru sendir til tilbúgvingarráðgevan til viðgerðar.

**Lógargrundarlag:** Løgtingslóg nr. 61 frá 15. mai 2012 um tilbúgving, sum broytt við løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020

> *§ 8. Kommunala tilbúgvingin skal, við fyrilit til váðan í kommununi, vera før fyri at fyribyrgja, avmarka og bøta um skaða á fólk, djór, umhvørvi, virði og ognir í sambandi við skaðahendingar ella vanlukkur, ella tá hóttandi vandi er fyri hesum. Kommunala tilbúgvingin skal eisini vera før fyri at taka ímóti, hýsa og í neyðugan mun kostarhalda bráðfluttum og fólki, sum orsakað av neyðstøðu eru komin illa fyri.*
> *Stk. 2. Kommunur kunnu, heilt ella fyri ein part, vera felags um kommunala tilbúgving. Avtalur um felags kommunala tilbúgving skulu góðkennast av kommunala eftirlitinum sbrt. § 51 í løgtingslóg um kommunustýri.*

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið Tvøroyra býráð til støðutakan.

**Býráðið 24. oktober 2022:**
Einmælt samtykt uppskot til samstarvsavtalu um felags tilbúgving millum Tvøroyrar kommunu, Hvalbiar kommunu og Fámjin Kommunu

**Býráðið 29. december 2022:**
Málið var kunnað

Fundurin lokin kl. 18:00

Kristin Michelsen

Anita Vibergsdóttir

Alvi Mortensen

Jónleyg Jespersen Bech

Bjarni Hammer

Kristina Roest

Súsanna Bertholdsen